# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Flora Heilmann framsýning á Landsbókasavninum





Gamla landsbókasavnið

Á Føroya landsbókasavni er í løtuni ein framsýning við myndum eftir Floru Heilmann (1872-1944). Flora Heilmann var donsk listakvinna, sum búði í Ónagerði á Viðareiði árini 1896-1906, meðan maður hennara var prestur har.

Myndirnar á framsýningini eru allar málaðar í tíðarskeiðnum 1897-1931, og tær eru partur av eini gávu sum Flora Heilmann gav Bókasavninum í Havn í 1931. Myndirnar vísa okkum ta gomlu føroysku húsabyggingina og gomul føroysk bygdarløg. Tær flestu myndirnar eru úr Havnini, men fleiri eru eisini úr øðrum bygdum kring landið.

Umframt myndirnar eru á framsýningini eisini tvær skitsubøkur við tekningum og akvarellum, sum Flora Heilmann gjørdi tey árini hon búði í Føroyum.

Framsýningin er opin fyri almenninginum til miðjan mai.



Av Húsagarði

## Andlát og jarðarferðir

**Leif Nolsø, Sørvágur**, fyrrverandi lærari, andaðist 7. mars á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, 79 ára gamal. Kistan fer úr kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrshúsi í dag kl. 14 til Dúgvuna. Kistan kemur í kirkjuna í Sørvági kl. 16:30. Jarðarferðin verður lýst seinni.

Kistan við **Nancy Verning** fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi í dag 8. mars kl. 18. Jarðarferðin verður úr Salem hósdagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Nancy, kunnu lata Salem á Tvøroyri eina gávu.

**Sigmund J. M. Joensen, ættaður av Tvøroyri**, búðsitandi í Keypmannahavn, andaðist sunnudagin 5. mars, 83 ára gamal.

**Olaf Andreasen, Tórshavn**, andaðist á Landssjúkrahúsinum fríggjadagin 3. mars 81 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Havnarkirkju mikudagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Olaf, kunnu lata eina gávu til Cystisk Fibrosufelagið, konta í peningastovnunum.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit tykkum mongu, sum vóru um og sýndu samkenslu, tá okkara elskaða kona, mamma, vermamma, omma og langomma

**Ruth Apol**
Tórshavn

andaðist og fór til gravar.

Takk fyri umsorgan í samband við sjúkralegu.
Ein serlig tøkk til heimarøktina.
Takk fyri blómur, kransar og heilsanir.
Hjartaliga takka vit øllum, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Eiko**

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við

**Dagurin í morgin**

**9. mars. Fjøruti riddarar**, deyðir í 320. Keisarin Licinius gav boð um, at øll kristin skuldu avnokta trúnna. Fjøruti riddarar í Sebaste í tí núverandi Turkalandi vildu ikki gera eftir boðunum og vórðu settir naknir út á ein ísflaka, men teir valdu allir, uttan ein, heldur at frysta í hel enn at ganga frá trúnni. Sum veðrið var henda dagin, skuldi tað vera teir komandi 40 dagarnar.

Sverri kongur Sigurðsson doyði hendan dagin í 1202 í Bergen.